# Soleiðis verður skilið

| | '02 | '01 | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | '95 | '94 | '93 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skála-EB/S | 3-1 | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 1-0-0 | 3-1 |
| NSÍ-FSV | - | 2-0 | 3-1 | - | - | 2-0 | - | 1-2 | - | - | 3-0-1 | 8-3 |
| HB-KÍ | 4-1 | 1-2 | 1-0 | 1-2 | 4-0 | 3-0 | 3-3 | 5-0 | 2-1 | 2-0 | 7-1-2 | 26-9 |
| GÍ-B36 | 2-2 | 3-1 | 1-0 | 2-1 | 5-2 | 0-2 | 3-0 | 2-0 | 2-0 | 2-1 | 8-1-1 | 22-9 |
| VB-B68 | 1-2 | 1-1 | 4-1 | 0-2 | 3-1 | 3-0 | 2-0 | 2-1 | - | 2-4 | 5-1-3 | 18-12 |

»Silvurið verður verandi á Toftum og B36 má taka til takkar við gullinum. FS Vágar flytir beinleiðis niður, og Skála fær sostatt enn ein møguleika at halda sessinum í deildini«

Tað verður í øllum førum endaliga støðan, um hagtølini skulu nýtast sum grundarlag undir spádómunum fyri úrslitini um vikuskiftið. Her eru nevnliga greiðar ábendingar um, at B36 fer at hava tað trupult í Gøtu, eins og FS Vágar koma at hava tað í Runavík. EB/Streymur hevur bert vitjað einaferð á Skála í bestu deildini, og tá vann Skála, og so kunnu teir flyta upp í bestu deildina. Um alt hetta heldur, so ger tað ikki mun hjá B68 og VB, hvat úrslitið har verður, og í Havn kann HB so taka sær av løttum móti KÍ.

Men eitt eru hagtøl. Annað er, hvussu leikur fer, tá fótbóltslandskappingin endar leygardagin. Tá kunnu hagtøl so ikki nýtast til nakað.

Men talvan sýnir so, hvussu tað hevur at tørna út, tá mótstøliðini leygardagin hava hitst í tilsvarandi uppgerðum í bestu deildini seinastu tíggju árini.

-jm

# Føroyskt Liverpool-felag

**Gongst sum ætlað fáa føroyskir Liverpool-fjepparar sítt egna viðhaldsfelag um eina viku**

FJEPPARAR
*Jákup Mørk*

Manchester United ella Liverpool. Tað tykist ofta vera stóra trætumálið, tá fótbóltshugaðir føroyingar tosa um enskan fótbólt. Sjálvandi eru eisini tey, sum halda við eitt nú Arsenal, Chelsea, Aston Villa ella Tottenham, men skal tosast um, hvørji feløg hava flest viðhaldsfólk her á klettunum, so er tað uttan iva tey bæði fyrst nevndu. Ivaleyst eisini tí hetta eru feløgini, sum hava duga best at savna inn heiðursmerkir seinastu fjórðingsøldina.

### Føroyskt felag

Seinastu tíggju árini hava tað uttan iva verið tey hjá Manchester, sum hava havt mest at reypa um, men tað verður helst skjótt, at Liverpool-fólkin í øllum førum á einum øki hava meira at breggja sær av. Skalt tú skrásetast sum Machester United fjeppari í Føroyum, so kann hetta lættast gerast við at seta seg í samband við norðurlendsku deildina av supporters-branch, sum skipaðu fjepparararnir nevna seg, men tað verður ikki neyðugt, um tú skalt rópa á Liverpool.

Her skal nevnliga vera møguligt at tekna seg í ein føroyskan Liverpool-club. Ein sum enntá hevur fingið blátt stempul beinleiðis av Anfield Road.

Tað eru teir báðir vestmenningarnir, Barry Bláhamar og Ellindur Olsen, sum hava tikið stig til nýggja felagið. Nakað væl av fyrireikan er farin fram undan hesum, og millum annað hava teir verið í sambandi við skrivstovuna hjá felagnum fyri at finna útav, hvat krevst fyri at seta eitt slíkt felag á stovn. Eitt av hesum krøvum eru, at í minsta lagi 25 komandi limir vera við á stovnandi aðalfundinum, og hetta rokna teir báðir við fer at bera til. Her skal viðmerkjast, at fyri at gerast sjálvstøðugur limur, so er tað krav, at viðkomandi er 16 ár, men børn undir hendan aldur kunnu tó tekna seg, um tey eru í felag við einum vaksnum persóni.

Eisini er kravt, at áskoðarafelagið skal hava eina sonevnda stam-pub, og tað fær nýggja felagið eisini við Bryggjuna í Vestmanna, sum Barry frammanundan eigur og rekur. So hetta var ikki nakar trupulleiki, skilst á lagnum.

### Spennandi fyrimunir

Tað verður so eisini á Bryggjuni, at stovnandi aðalfundurin verður, og hetta verður sjálvsagt gjørt í samband við ein fótbóltsdyst. Enska kappingin liggur still hetta vikuskiftið, men avgerandi landsdysturin millum Turkaland og Onglad (við fleiri Liverpool-leikarum) er á skránni, og hesin verður sendur beinleiðis kl. 18.00. Fundurin sjálvur er settur at byrja klokkan 16.00.

Og tað eru fleiri fyrimunir hjá teimum, sum tekna seg sum lim í áskoðarafelagnum. Sum skrásett viðhaldsfelag hevur felagið heimild at skipa fyri ferðum til Anfield Road, og umvegis limaskap sín vera tryggjað atgongumerki til dystirnar. Hartil er eisini møguleiki fyri, at gamlar Liverpool-kempur av og á koma á vitjan hjá stuðlunum, og hvør veit, kanska verður sjálvt liðið eisini at síggja í dysti á føroyskari grund fyrr ella seinni?

**Máltindurin, 1. deild**

adidas

| | | |
|---|---|---|
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 13 |
| John Petersen | B36 | 9 |
| Sorin Anghel | EB/S | 9 |
| Andrew av Fløtum | HB | 9 |
| Heðin á Lakjuni | B36 | 8 |
| Jákup á Borg | B36 | 7 |
| Clayton Soares | FSV | 7 |
| Rógvi Jacobsen | HB | 7 |
| Helgi L. Petersen | NSÍ | 7 |
| Birgir Joensen | FSV | 6 |
| Bartal Eliasen | GÍ | 6 |
| Tór-Ingar Akselsen | HB | 6 |
| Karsten From | NSÍ | 6 |
| Sonni L. Petersen | NSÍ | 6 |
| Birgir Jørgensen | VB | 6 |
| Milan Kulic | VB | 6 |
| Súni Fríði Johannesen | B68 | 5 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 5 |
| Súni Olsen | GÍ | 5 |
| John Heri Dam | B68 | 4 |
| Egil á Bø | EB/S | 4 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 4 |
| Ronnie Samuelsen | EB/S | 4 |
| Kim Poulsen | FSV | 4 |
| Símun Samuelsen | GÍ | 4 |
| Rúni Nolsøe | HB | 4 |
| Sjúrður Jacobsen | NSÍ | 4 |

**1. deild menn**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 17 | 11 - 5 - 1 | 38 | 15 | 23 | 38 |
| 2 | B68 | 17 | 10 - 5 - 2 | 26 | 14 | 12 | 35 |
| 3 | B36 | 17 | 11 - 1 - 5 | 34 | 19 | 15 | 34 |
| 4 | NSÍ | 17 | 8 - 5 - 4 | 31 | 18 | 13 | 29 |
| 5 | KÍ | 17 | 7 - 3 - 7 | 27 | 27 | 0 | 24 |
| 6 | EB/Streymur | 17 | 6 - 6 - 5 | 31 | 33 | -2 | 24 |
| 7 | GÍ | 17 | 5 - 5 - 7 | 25 | 29 | -4 | 20 |
| 8 | VB | 17 | 3 - 4 -10 | 15 | 30 | -15 | 13 |
| 9 | FS V | 17 | 3 - 2 -12 | 25 | 43 | -18 | 11 |
| 10 | Skála | 17 | 3 - 0 -14 | 13 | 37 | -24 | 9 |

**2. deild menn**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 17 | 12 - 3 - 2 | 36 | 15 | 21 | 39 |
| 2 | TB | 17 | 11 - 2 - 4 | 50 | 23 | 27 | 35 |
| 3 | Sumba | 17 | 9 - 5 - 3 | 34 | 15 | 19 | 32 |
| 4 | AB | 17 | 7 - 5 - 5 | 34 | 21 | 13 | 26 |
| 5 | B36 | 17 | 6 - 4 - 7 | 29 | 23 | 6 | 22 |
| 6 | KÍ | 17 | 7 - 1 - 9 | 32 | 51 | -19 | 22 |
| 7 | B71 | 17 | 6 - 2 - 9 | 28 | 22 | 6 | 20 |
| 8 | VB | 17 | 6 - 2 - 9 | 28 | 27 | 1 | 20 |
| 9 | LÍF | 17 | 6 - 1 -10 | 23 | 44 | -21 | 19 |
| 10 | B68 | 17 | 2 - 1 -14 | 9 | 62 | -53 | 7 |

Sosialurin hevur fingið nýtt telefonnummar
tel 34 18 00
fax 34 18 01
heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo

VARPIÐ
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá
TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network
Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2



GÍ-B36:

# Vilja enda væl

**B36 skal spæla fyri silvurmøguleikanum, og hjá GÍ ræður bara um at enda árið væl**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Talið av havnarfólki, sum ætlaði sær til Gøtu á seinasta leikdegi mundi falla nakað nógv, tá Tór-Ingar Akselsen í 81. minuttir skeyt HB á gullkós seinasta vikuskifti. Eitt mál, sum í veruleikanum merkti, at gullmøguleikin hjá árstalsfelagnum hvarv

Nú stendur eftir, at talan í Gøtu verður um næstan týdningarleysan dyst, tó at B36 við einum sigri møguliga kann spæla seg til silvurið heldur bronsuna, men tað gera teir so ikki einsamallir av.

Hjá GÍ er tað bert ærann, sum er upp á spæl. Var B36 fremst undan hesum, so kundi GÍ tryggjað sær Europa-Cup pláss við at tapa (!), men tann møguleikin er so ikki til staðar longur.

Nú ræður einamest um at tryggja sær, at liðið ikki fær vánaligastu endastøðuna, síðani teir í 1980 fyri fyrstu ferð leiktu í bestu mansdeildini.

Vánaligasta avrikið er higartil sjeynda plássið í 1989, og hvussu víkir og vendur, so verður talan aftur hesaferð um eitt sjeynda pláss. Ta ferðina – í 1989 – hevði GÍ 16 stig, men umroknað til trý-stiga skalan hevði talan verið um 23 stig og ein negativan málmun á fimm stig. Í ár kann GÍ við einum sigri røkka 23 stigum, og málmunurin verður tá ikki verri enn minus trý, og einki er at ivast í, at dagsins GÍ ikki vil verða tað ringasta í felagssøguni.

Einasta fráveran hjá GÍ til dystin tykist vera leikandi venjarin, Krzystof Popczynski. Hann byrjaði inni á Svangaskarði seinast, men mátti skaddur fara av vøllinum, so enn tykist hansara kappingarár ikki at hava fingið nakra positiva vend.

Í B36 ásanna tey sjálvandi, at møguleiki er fyri silvurinum, og tað er so sjálvandi tað, sum farið verður eftir. Nøkur katastrofa er tað tó ikki, um liðið ikki nær hesum málinum, tí hvussu víkir og vendir, so merkir steypasigurin, at tað verða B68 og B36, sum fáa tey bæði UEFA-plássini.

Og hóast slagið um Havnina og gullið tók fast hjá felagnum, so merkist hetta ikki í fráveruni. Eingir skaðar og eingi leikbann gera um seg, so á pappírinum skuldu møguleikarnir fyri einum sigri í øllum førum verið góðir.



*Hóast silvurið kann røkkast, so munnu bæði GÍ og B36 kenna tað, sum um tað bert er æran upp á spæl leygardagin. Men tað kann eisini vera borgan fyri góðum undirhaldi*

NSÍ-FS Vágar:

# FSV skal spæla fyri lívinum

**Tað hevur ikki gingið, sum teir høvdu ætlað og vónað, ásanna teir i Vágum, sum hesa ferð hava Jóhannis Joensen við aftur**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Undan kappingarbyrjan søgdu teir í FS Vágum seg vóna, at tað fór at eydnast teimum at slepp undan botnstríðnum, og teir hildu seg hava nóg góða manning til, at vónirnar kundu gerast til veruleika.

Nú eigur FSV bara ferðina til Runavíkar á. Tá ið teir fara úr Vágum er FSF 1. deildarlið. Um teir eisini vera í bestu deildini, tá ið teir fara vestur aftur, valdast um úrtøkuna í Runavík, og tað valdast eisini um, hvussu tað fer at ganga hjá skálamonnum ímóti EB/-Streymi.

At tað ikki hevur verið soleiðis, sum teir høvdu vónað og roknað við, ásanna vágamenn. Tá ið tað kemur til at finna orsøkir verður tað víst á, at gamli veikleikin, ikki at leggja so nógv fyri í venjingini, sum tað er neyðugt, ikki hevur gjørt um seg í ár.

– Spælararnir hava verið óførir at møta til venjingar, og teir hava arbeitt væl, staðfestir Albert Ellefsen.

Hví hevur tað so ikki gingið, sum tit høvdu ætlað?

– Tað mugu vit staðfesta, at tað ikki hevur. Millum orsøkirnar er, at vit ikki hava havt møguleika at spæla við einum og sama liði. Skaðarnir hava verið ov nógvir. Eitt nú hevur Jóhannis Joensen, sum hevur verið liðformaður og ein av álitismonnunum, ikki spælt, síðani hann noyddist at fara út ímóti B68. Tað er meiri enn ein mánaði síðani. Men sum heild hevur kappingin verið hørð.

Hesa ferð eru teir flestu av teimum tøkir hjá FS Vágum, sum hava spælt síðani summarsteðgin Jóhannis Joensen hevur vant í vikuni, og teir rokna við, at hann fer at royna at spæla í dag. Kim Poulsen er framvegis skaddur, og Eyðfinn Fjalsbak tykist ikki vera komin fyri seg aftur. Hann varð skaddur undan summarsteðginum. Hann hevur roynt at venja aftur, men tað hevur gingið striltið.

NSÍ er undan síðsta umfarinum á fjórða plássinum, og tað verða teir eisini eftir heimadystin ímóti FS Vágum – uttan mun til hvat úrslitið verður.

Tað hevur verið eitt sindur at hoyrt um, at NSÍ venjarin hesa ferð fór at geva onkrum óroyndum spælarum møguleikan, og at NSÍ liðið tískil ikki fór at verða so væl fyri, sum tað kundi verið.

*Hvussu verður tað við hesum?*

– Vit hava skyldu yvirfyri okkum sjálvum og øllum hinum at spæla við so góðum liði, sum tað ber til. Nógv bendir á, at tríggir av teimum, sum plaga at vera á liðnum, ikki vera førir fyri at spæla ímóti FS Vágum, men vit fara at gera alt fyri at fáa øll stigini, sigur Jógvan Martin Olsen, NSÍ venjarin.

Jústinus R. Hansen, sum hevur tikið seg støðugt nærri plássi millum teir fyrstu ellivu, er leikbannaður. Miðvallarin, Rúni Rasmussen, hevur verið sjúkur alla vikuna, og Jónstein Petersen, sum saman við Messias Pereira man vera tann NSÍ spælarin, sum hevur staðið eina sterkast í myndini hetta kappingarárið, hevur ikki vant í vikuni. Orsaka av skaða var hann ikki við í Klaksvík, og tað er rættuliga ivasamt, um hann verður førur fyri at spæla í dag.



*Vágamenn skulu hava trý stig, um teir skulu vera vísir í at sleppa undan beinleiðis niðurflytingini*

## KÍ-kæran avvíst

Hósdagin hevði kappingarnevndin hjá FSF fund, har støða millum annað skuldi takast til kæruna, sum KÍ hevði sent inn viðvíkjandi dystinum móti NSÍ seinasta sunnudag. Ein dystur, har KÍ helt seg fyri órætti frá dómaranum, sum teir hildu millum annað hevði givið nøkur ógrundað gul kort. Kort sum eisini bóru leikbann til dystin móti HB við sær, og sum klaksvíkingar tí vildu hava strikað.

Men hetta varð tó sópað av borðinum hjá kappingarnevndini. Hetta tí tað í ÍSF-reglurgerðunum fyri dómsnevndir er staðfest, at sersambond ikki kunnu broyta dómarans meting í kapping. Hendan reglan hevur áður verið nýtt, tá feløg hava kært um dómaraavrik, og í bestu mansdeildini kom hetta seinast fyri, tá B36 í 2000 vildi ógilda dystin, sum felagið hevði tapt fyri B71.

Karl Vidtfeldt, formaður í kappingarnevndini, sigur, at nevndin als ikki hevur møguleika at viðgera kæruna, og at hendan tí er avvíst. Viðvíkjandi dómaraavrikinum sjálvum, sum KÍ eisini hevur kært um, sigur hann, at hetta verður eitt mál, sum dómaranevndin skal taka støðu til.

*- jm*